# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Mentan raðfestast!

Í síðstu viku gjørdu fýra mentafólk vart við syndarligu støðuna á mentanarpolitiska økinum. Tey vístu á, at vit í Føroyum als ongan mentanarpolitikk hava, og at listafólkini ongan góða hava hvørki á løgtingi ella í landsstýri. Nú eru hesar atfinningar komnar fram beint upp undir val, tá stór misnøgd ofta kemur til sjóndar. Hinvegin er lítið at ivast í, at støðan er vánalig, um vit samanbera okkum við grannalondini, har mentanarpolitikkur verður mettur eins týðandi og annar politikkur, eitt nú umhvørvispolitikkur, skúlapolitikkur o.a.

Nú vóru atfinningarnar ikki heilt rættvísar, tí nøkur øki hava fingið økta játtan seinastu árini, víst so, men hinvegin mugu vit ásanna, at nakað er um atfinningarnar. Støðan er vánalig, og hetta er ikki orsakað av, at okkara politikkarar ikki skilja týdningin av mentan og list. Taka vit Visjón 2015, so er mestsum eingin endi á vælvildini, og her kann ein eisini staðfesta eina púra greiða fatan av tí týdningi, sum politikkkarar meta mentan og list at hava fyri borgaran, fyri búskapin og fyri trivnaðin í okkara samfelag. Eru orðaskifti á løgtingi, har nomið verður við mentanarspurningar, eru tingmenn sera jaligir og á einum máli um, at tað almenna skal stuðla mentan og list. Men tá so fíggjarlógaruppskotið eftirfylgjandi kemur á tingborð, sæst lítið og einki til vælvild og føgur orð. Tey vóru bert føgur orð!

Hvat er tað so, sum er galið? Hví lekur millum teori og praksis? Hetta má hava nakað við raðfestingar at gera. Tá tykist, sum mentan og list eru fastir taparar, tá ein samgonga skal semjast um fíggjarlógaruppskotið. Øll vita, at eitt fíggjarlógaruppskot verður til sum úrslit av drúgvari togan millum landsstýrismenn, flokkar og embætisfólk. Tann, sum hevur síðsta og avgerandi orðið, er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum. Tað er sostatt ikki nóg mikið, at ein landsstýrismaður í mentamálum raðfestir stuðulin til mentan og list. Um fíggjarmálaaharrin ikki hevur somu raðfesting, so verður mentanin taparin – og taparin hevur hon verið so langt, vit kunnu minnast. Tað harða vinnur á tí bleyta. Hetta kann ikki halda fram, og tí hava mentafólkini, listafólkini og samfelagið alt krav uppá, at mentan framyvir verður raðfest. Tað skuldi ikki verið neyðugt mótvegis eitt nú verandi samgonguflokkum at grundgivið fyri slíkari raðfesting. Hesir flokkar kunnu jú bara lesa teirra egnu Visjón 2015, har tað væl og virðiliga er staðfest, at mentan og mentanarpolitikkur bæði loysa seg búskaparliga og eru ein meginfortreyt fyri menning, vælferð og trivnaði.

**Sosialurin**

# Gloym íverksetaragrunnin

**Milliardir standa bara og bíða eftir íverksetarunum. Politiski myndugleikin skal heldur syrgja fyri, at hesir eru nóg nógvir í tali**

**SÍÐULINJAN**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*





Íverksetan er vorðið eitt satt mótaorð í valstríðnum. Ikki uttan orsøk, kundi hóskandi verið lagt afturat, tí eitt enn meira fjøltáttað vinnulív vil sjálvandi geva økt skatta- og búskapargrundarlag.

Fleiri valevni hava eisini sett sær fyri, at koma tey á ting, skal peningur setast í ein íverksetaragrunn, men tá má nú vera ein heilt stór misskiljing.

Tí peningur trýtur ikki til tað endamálið. Havi ikki roknað stovnsfæið hjá ymsu framtaksgrunnunum saman. Men nú bæði bankarnir fyriuttan landið eiga heilt ella lutvíst ein slíkan grunn, man samlaði kapitalurin til íverksetan fara væl upp um milliardina.

Hvør sum ein hava hesir grunnar til endamál at seta pening í verkætlanir, ið verða mettar burðadyggar. Skal ein íverksetaragrunnur hava til endamál at seta pening í ætlanir, ið IKKI verða mettar burðadyggar? Ætlanir, sum kanska eru vrakaðar av øllum hinum, og har landið tá skal átaka sær leiklutin sum fíggjarligur garantur.

Skal tað gerast, so má tað væl gerast út frá paroluni um, at fyri hvørji 50 hugskott er eitt gullegg. Ella kanska skal virksemi bara skapast fyri ein og hvønn prís. Júst sum tað varð gjørt við effektivu veðhøldunum fyri 20 árum síðani. Tey flestu munnu so vita, hvussu tann parturin gekk.

John Cleese varð á sinni spurdur, hvat skapti eina góða joke ella sketch. Hann svaraði tá, at ein slík íkemur, tá tú koplar tvær støður saman upp á ein higar til ókendan máta.

Og júst her liggur lykilin til innovatión, nýskapan og íverksetan. Veruleikin er jú, at heimurin ikki hevur sæð nakra nýggja uppfinning í nógv harrans ár. Ja, helst í fleiri øldir. Øll framstig, ið eru gjørd í so máta, eru betranir av verandi vitan ella nýggj og øðrvísi gagnnýtsla longu kendum faktorum.

Fortreytin fyri hesum er tó vitan. Sjálvandi ber til við avmarkaðum vitunartilfeingi at fáa góð hugskot. Tað hava eisini føroyingar sýnt. Men størri vitunartilfeingi eitt samfelag hevur, jú størri eru sannlíkindini fyri, at fólk úr júst hesum samfelagnum koma við teimum genialu hugskotunum.

Betraðir og øktir útbúgvingarmøguleikar eru sjálvandi eitt svar upp á hendan spurningin. Trupulleikin er bara, at tað í sjálvum sær neyvan gevur nakað úrslit hesumegin 2015.

Komandi 5-10 árini eru tí gylt høvi hjá landsins kosnu at prógva í verki, at tey vilja hava vitug fólk aftur á klettarnar. Væl útbúnar føroyingar, harav fleiri starvast uttanlands, tí tað í løtuni er her, at tey fáa bestu treytirnar.

Eitt valevni hevur mær vitandi sett fram uppskot um eina velduga maritima granskingarpark. Har var eitt hugskot, sum kann muna, so skjótt sum ætlanin verður sett í verk. Tí hvat vildi ein slík granskingarpark ikki kastað av sær av góðum hugskotum? Eg vildi so sagt, at tað eru slíkir politikarar, ið vit hava tørv á!

Onnur loysn kundi verið ein stuðulsskipan, har endamálið var at lokka góðar knokkar til Føroya. Eitt nú kundi ein skipan verið, at fyritøkur við einum árligum umsetningi niðan fyri 10 mió kr., fingu stuðul til lønina hjá einum starvsfólki við candidatútbúgving ella líknandi. Stuðulin kundi so verið avmarkaður til tvey-trý ár. Líknandi skipanir hava verið royndar uttanlands við serstakliga góðum úrslitum.

Hvør loysnin so verður, so eigur hendan frá almennari síðu at avmarka seg til at lokka útlendskt tilfeingi og at varðveita føroyskt tilfeingi. Megna vit tað, so munnu milliardirnar til íverksetan ikki tróta.

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.